# Vilja hava eina loysn sum liggur mitt ímillum

**Kommunusamskipan Føroya tekur ikki undir við, at barnaverndirnar kring landið, nú skulu verða landsnevndir, soleiðis sum landsstýrið ætlar. Felagið er heldur ikki samt við landsstýrið um, hvussu nógvar barnaverndir skulu vera**

BARNAVERND
*Áki Bertholdsen*

Barnaverndirnar kring landið skulu framvegis vera kommunalar. At taka eitt øki frá kommununum og leggja tað undir landið, er tann øvugta verð.

Tað heldur Kommunusamskipan Føroya, sum er felagið hjá teimum seks størstu kommununum í landinum og Kirkjubøar Kommunu.

Jógvan Krosslá, formaður í Kommunusamskipan Føroya, sigur, at felagið er heldur ikki samt við landsstýrið um, hvussu nógvar barnaverndir skulu vera.

Nú Almanna- og Heilsumálastýrið hjá Landsstýrinum hevur gjørt eitt álit um, hvussu barnaverndarøkið skal skipast framyvir, er tað sostatt, at Kommunusamskipan Føroya, sum umboðar nógv størsta partin av Føroya Fólki, ikki tekur undir við ætlanini.

Almanna- og Heilsumálastýrið mælir til at býta Føroyar sundur í seks barnaverndarøki við hvør sínari barnavernd, sum landið skal velja. Limirnir í teimum nýggju barnaverndunum skulu vera serkøn á ymsum økjum, sum hava vit barnaumsorgan at gera.

Ætlanin var, at Kommunusamskipanin og landsstýrið skuldi hava fund í gjár um ætlanina, men fundurin er útsettur og verður seinni.

Men Jógvan Krosslá sigur, at Kommunusamskipanin tekur hvørki undir við, hvussu nógvar barnaverndir skulu vera, ella, hvussu tær skulu skipast.

– Vit mæla til, at tað verða níggju barnaverndir kring landið, ístaðin fyri tær seks, sum Almanna- og Heilsumálastýrið skjýtur upp.

Afturat teimum seks barnaverndunum í uppskotinum hjá Landsstýrinum, mælir Kommunusamskipanin til, at Suðuroy verður býtt sundur í tvey øki við hvør sínari barnavernd, einari í norðaru helvt og einari í syðru helvt. Somuleiðis mælir felagið til at býta Eysturoynna í tvey øki og at ein barnavernd eisini verður skipað fyri kommunurnar í Sundalagnum.

– Hetta hava vit gjørt fyri at fylgja sundurbýtinum í kommunuálitinum, tí tað halda vit er greiðari, sigur Jógvan Krosslá.

Hann heldur eisini, at hetta fer at trygga, at barnaverndarlimir verða úr so nógvum bygdum sum gjørligt, tí tað heldur hann hevur týdning fyri at vera so nær borgarunum sum gjørligt.

Annars hevur atfinningin ímóti barnaverndunum júst verið, at tey eru ikki serkøn á økjunumog tí ikki hava nóg góðar fortreytir fyri at arbeiða við slíkum málum, ið ofta eru umfatandi og fløkt?

Tað er rætt, men í økisráðunum koma barnaverndirnar altíð at hava sakkunnleikan við hondina.

### Skulu vera kommunalar

Men ein tann mest avgerandi munurin ímillum Landsstýrið og Kommunusamskipanina er, at Landsstýrið vil hava, at tað skal verlja barnaverndirnar kring landið.

Hinvegin heldur sær heldur Kommunusamskipanin ikki at tað er rætt at taka barnaverndirnar frá kommununum og leggja tær undir landið.

– Í hesum døgum, har nógv verður tosað um at leggja fleiri og fleiri málsøki út til kommunurnar, er tað øvugt mannagongd at taka eitt øki frá teimum og leggja tað undir landið, sigur hann.

– Tí sigur hann, at í Kommunusamskipan Føroya er hørð mótstøða ímóti at landið nú skal yvirtaka barnaverndarøkið.

Hann vísir á, at tað eru fólk á staðnum, sum kenna umstøðurnar best og tí er tað rætt at varðveita tær kommunalu barnaverndirnar.


Savnsmynd

Hann heldur, at tað fakliga støðið í barnaverndunum kann tryggjast við at seta økisráð í hvørjum øki, kanska trimum limum í, sum skulu vera serkøn fólk og sum barnaverndirnar kunnu ráðføra seg við.

Í Suðuroynni mælir Kommunusamskipanin til, at tað verður eitt økisráð fyri alla oynna og somuleiðis í Eysturoy.Hóast barnaverndirnar skulu vera níggjum heldur hann, at tað er nóg mikið við seks økisráðum til at fevna um alt landið.

Felagið heldur, at tað skulu eisini vera kommunurnar, sum skulu velja økisráðini.

Hann vísir á, at øll vanlig viðurskifti hjá børnum eru longu undir kommununum, men hann ásannar tó, at innan barnaforsorg eru nógv viðurskifti, tosast kann við landsstýrið um, men tað er heilt annað mál, heldur hann.

# Barnaverndirnar kring landið skulu varðveitast

**Føroya Kommunufelag tekur ikki undir við ætlanini hjá Almanna- og heilsumálastýrinum um at taka barnaverndirnar hjá kommununum**

BARNAVERNDIR
*Áki Bertholdsen*

– Barnaverndirnar hjá kommununum kring landið virka væl. Men tær átti at blivið styrktar.

Tað heldur Føroya Kommunufelag.

Sostatt eru bæði kommunufeløgini, sum tilsamans umfata allar kommunurnar í landinum ímóti ætlanini hjá Almanna- og Heilsumálastýrinum at umskipa barnaverndirnar, tí í hinari greinini her á síðuni sæst, at eisini hitt kommunufelagið er ímóti ætlanini.

Tað, sum Almanna- og Heilsumálastýrið ætlar, er,at barnaverndirnar hjá kommununum skulu takast av. Ístaðin skal landið býtast sundur í seks øki við hvør sínari barnavernd, sum Landsstýrið skal velja.

Jacob Vestergaard, formaður í Føroya Kommunufelag, sigur, at tað er nógv gott í uppskotinum hjá Almanna- og Heilsumálastýrinum, men at felagið er ímóti at tað verður sett í verk, sum tað er.

Heldur kundi Kommunufelagið hugsað sær, at partar av uppskotinum verða brúktir til at styrkja skipanina við, sum nú er í gildið.

Formaðurin í Kommunufelagnum heldur, at tað er ein spurningur um, hvør skal hava málsøki undir sær, landið ella kommunurnar.

– Í dag er tað ein blandingur við tað, at kommunurnar velja barnaverndirnar, men fáa útreiðslurnar endurgoldnar frá Almannastovuni.

Kommunufelagið heldur, at skipanin, sum er virkar sum heild væl og tí skal málsøkið leggjast til kommunurnar,heldur enn til landið.



*Bæði kommunufeløgini eru ímóti, at barnaverndarnir kring landið verða tiknar av, soleiðis sum Almanna og heilsumálastýrið mælir til. Jacob Vestergaard, formaður í Føroya Kommunufelag, v.m. og Jógvan Krosslá, formaður í Kommunusamskipan Føroya siga, at tað er ein stórur fyrimunur, at barnaverndarlimir eru staðkendir*

–Tað, sum ikki virkar í skipanini sum er, er tað, at í ávísum málum er ikki altíð so lætt hjá barnaverndunum at fáa tað serkønu hjálp og ráðgeving, sum tørvur er á.

– Verður landsið býtt sundur í seks øki við hvør sínari barnavernd, sum landið skal velja, missa vit tann fyrimunin, sum barnaverndir hava, at tær eru staðkendar, tí staðkend fólk hava mangan betri førleikar enn fremmand at skilja ein ávísan trupulleika, sum stingur seg upp.

Hann heldur, at besta skipanin er tí at varðveita tað skipanina sum er, men at styrkja hana við við serkønum fólkum.

– Tað er óneyðugt við serkønum fólki í hvørjum øki í landinum, tí so nógv barnaverndarmál eru ikki.

Jacob Vestergaard sigur, at viðhvørt verður dagt, at tað eru børn, sum eru dottin burtur ímillum, sum skipanin er nú, men tað dugir hann ikki at síggja.

– Barnaverndarmál eru trupul og tað er altíð ein neyv meting um, nær barnaverndin skal leggja upp í, ella ikki.

Sjálvur er Jacob Vestergaard løgreglumaður og hevur tí eisini eina ávísa føling við økinum, tí viðhvørt kemur løgreglan uppi í.

– Tað er mín avgjørda fatan, at barnaverndirnar gera eitt dygdargott arbeiði og taka uppgávuna í stórum álvara.

Hann heldur ikki, at tað er ein vansi, at barnaverndirnar eru ov nær og at tað kann forða fyri, at mál verða tikin upp, sum annars átti at verið tikin upp.

hann hevur tvørtur ímótri tað fatan, at tað er ein fyrimunur, tí barnaverndarmál eru mangan sera samansett og trupult og tað er ein fyrimunur at kenna viðurskiftini og bakgrundina væl og tað ger fólk á staðnum betri enn fólk uttaneftir.

Í uppskotinum hjá Almanna- og heilsumálastýrinum verður lagt upp til, at skulu tiltøk setast í verk ímóti einum heimi, eitt nú at børn skulu takast heiman ífrá, skulu tað verða dómstólarnir, sum taka avgerðina.

Tað er eitt, sum formaðurin í Kommunufelagnum tekur undir við.

– Tað er ein ábyrgd, sum kann leggjast á dómstólarnar. Men tað sigur mær eisini so mikið sum tað, at tað er neyðugt at lýsa málið professionelt og út í æsir, tí annars tekur dómstólurin ikki undir við teimum.



# Aimi sendiharri í Athen


*Aimi Thomsen her avmyndað í føroyskum ferðalag í summar á gamla olympiska stadion í Athen*
*Mynd: Jan*

**Aimi Thomsen, sum er av Strondum, men býr í Athen, er útnevnd, sum sendiharri fyri Føroyar í Paraolympiaduni, sum verður í Athen í 2004**

OL
*Ingrid Bjarnastein*

Paraolympisku leikirnir vera í Athen í ár 2004. Føroyar verða eisini umboðaðar á leikunum, og er Aimi Thomsen av Strondum útnevnd, sum sendiharri fyri Føroyar.

Fyri stuttum var aðalfundur í Athen við Paraolympisku komiteeina, har Jógvan Jensen var við.

Skipað er fyri soleiðis, at aðalfundurin er altíð á sama býi, sum paraolympisku leikirnir skulu vera.

Aimi Thomsen av Strondum hevur búð í Grikkalandi við grikska manni sínum síðani 1995. Seinastu trý árini ella so hevur hon búð í Athen. Tá Jógvan Jensen var á aðalfundinum, varð Aimi útnevnd til sendiharra. Hon skal taka sær av teimum praktisku tingunum, sum til dømis fundir í nevndum og annað.

Tá leikirnir so verða í 2004, skal Aimi hjálpa føroysku ítróttarfólkunum við at koma skjótt fram, upplýsa tey, hvar tey skulu fara og undir leikunum, skal hon virka sum eitt slag av ferðaguide.

Í sambandi við aðalfundin var nýggjur presidentur valdur í IOC, og hugt varð eisini eftir støðunum har leikirnir skulu fara fram, og er alt mestsum klárt. Gomlu stadionini verða endurnýggja í sambandi við leikirnar.

Jógvan Jensen veit at siga, at føroyingar eru longu kvalifiseraðir í svimjing, og sum er nú, so hava vit eisini svimjarar, sum kunnu umboða Føroyar á leikunum. Miðað verður eisini ímóti at Føroyar kunnu vera við í borðtennis, bogaskjóting og frælsum ítrótti. Í tveimum teimum seinastu verða kvalifikatiónstíðir tó kravdar.

# Uni Joensen á fløgu

4. januar kom út fløga við heitinum Guesthouse. Uni Joensen syngur, meðan Ronnie Nielsen stendur fyri meginpartinum av spælda tónleikinum á fløguni. Talan er um átta popp-løg, sum Uni sjálvur hevur skrivað, meðan hann og Ronnie í felag hava gjørt tónleikin. Eisini aðrir kendir føroyskir tónleikarar eru við á onkrum á løgunum, sum til dømis Sámal Ravnsfjall og Kollbein Simonsen. Tað er plátufelagið Tutl, sum gevur fløguna út.

-ib




# Tutl útgávur januar 2002

**04.01:** - HJF 84: Uni Joensen & Ronnie Nielsen – Guesthouse
**10.01:** - HJF 85: Týr – How Far to Asgaard
**14.01:** - GFL 3: Alex Bærendsen & Símun úr Konoy – Livandi boðskapur
**15.01:** - HJF 85: Øssur Johannesen & Hjalti Joensen – bass & gittar
**15.01:** - HJF 12 Yggdrasil & William Heinesen/Kristian Blak – Den yderste ø
**15.01:** - HJF 13 Yggdrasil & Kristian Blak/Philippe Carré - Ravnating

ÚTSØLA
Útsøla byrjar
fríggjadagin 11. januar
kl. 08.00
ALT 1/2 prísur
Opið er til kl. 19.00
29 Í Tróndargøtu
tel. 318200